# Øll posthúsini hvørva

**Fram til 2015 noyðist Posta at varðveita sjey posthús, men posthús í verandi liki eru ikki neyðug longur, sigur Sofus Clementsen, stjóri í Posta**

Randi Jacobsen



*Postusið í Runavík letur ikki aftur í hesum umfarinum, men um nøkur ár verða eingi posthús í verandi líki eftir*

Tíðin er farin frá posthúsunum, soleiðis sum tey vóru. Bara fá fólk hava longur ørindi á posthúsinum, tí rokningar verða rindaðar antin í peningsstovunum ella gjøgnum internetið. Frímerki og brævbjálvar verða avgreidd í handlum, sum hava leingi opið.

Og pakkar, ið áður vórðu heintaðir á posthúsinum, verða í dag koyrdir til dyrnar hjá móttakaranum. Harafturat økjast sjálvgreiðslumøguleikarnir, eins og vit síggja tað uttanlands, tí kundin í dag vil hava sínar sendingar, tá tað passar honum.

Nógv harmaljóð vóru at hoyra, tá ið Posta fór undir at lata posthús aftur og stytta um avgreiðslutíðir, men nú mótmælir eingin, tí folk flest í bygdunum við posthúsi halda seg hava fingið nógv betri tænastu við koyrandi posttænastuni hjá Posta.

Nú hevur leisðlan tikið avgerðina um á nýggjárinum at lata aftur 13 av posthúsunum, sum eftir eru í landinum.

### Posthúsini óneyðug

– Fram til 2015 skulu sjey posthús verða, tí tað sigur postlógin, men posthúsini eru ikki neyðug longur, sigur Sofus Clementsen, sum ikki ivast í, at øll posthúsini í verandi líki fara at hvørva.

Posthúsini, sum lata aftur á nýggjárinum eru á Eiði, í Fuglafirði, í Gøtu, í Hvalba, í Kollafirði, í Leirvík, í Sandavági, í Skopun, á Strondum, í Sørvági, á Toftum, í Vági og í Vestmanna.

### Betri tænasta

Sofus Clementsen heldur, at tey, sum í staðin fyri posthús, fara at brúka koyrandi posttænastuna, fáa nógv betri tænastu. Nógvastaðni eru posthúsini bara opin nakrar fáar tímar um dagin. Koyrandi tænastan virkar millum klokkan átta á morgni til klokkan 21. Tað er bara at ringja, so kemur bilurin við ella eftir postinum. Bilatænastan avgreiðir eisini eitt nú ALS-kortini.

Postastjórin er ikki bangin fyri, at Posta við hesum grevur sína egnu grøv. Mobilu tænastuni verður framyvir tørvur á, og Posta liggur eisini framvið at fáa aðrar tænastur frá tí almennu viðvíkjandi útkoyring til borgararnar.

### Selja posthús

Tá ið posthúsini lata aftur, verða fýra ella fimm størv niðurløgd. Tað eru ikki fleiri, tí summi postfólk arbeiða á fleiri posthúsum.

Fólkini, sum sita í størvunum, ið verða løgd niður, kunnu søkja onnur størv í Posta.

Posta eigur bara nøkur fá av posthúsunum, ið lata aftur. Hini eru øll í leigaðum hølum.

Í næstu viku verður posthúsið á Eiði lýst til sølu, men støða er enn ikki tikin til, hvørjar av hinum ognunum Posta kann vera fyriuttan.

# Fólk við felags lagnu hittust

**Fyri fyrstu ferð síðan flogvanlukkuna í Mykinesi fyri 40 árum síðan, fingu avvarðandi høvi at seta spurningar**

Randi Jacobsen

Alt gekk sum eftir ánni, tá fólk sunnumorgunin fóru til Mykinesar til minningarhaldið yvir tey átta fólkini, sum lótu lív í flogvanlukkuni har fyri 40 árum síðan.

Tey 120 fólkini fóru ið tveimum bátum og við tyrlu út í Mykines, har minngarplátan varð sett upp, og røður vórðu hildnar.

Fyrireikingarbólkurin var samansettur av einum umboði fyri hvørja familju, sum misti.

Ein teirra var Steintór Jacobsen.

- Men tað var mamma, sum kom við hugskotinum. Seinasta vetur kallaði hon okkum systkin ein dag saman og segði, hvussu løgið hon helt tað vera, at einki varð gjørt, sigur Steintór Jacobsen.

91 ára gamla mamma hansara, Bina Rasmussen var við í Mykinesi sunnudagin.

Tey fægstu av teimum, sum vóru við til haldið, høvdu verið á vanlukkustaðnum áður. Tey 120 fólkini høvdu øll okkurt við hendingina at gera. Antin vóru tey við flogfarinum, høvdu mist onkran ella verið við til bjargingina.

Tá í tíðini var einki, sum æt sálarlig kreppuhjálp, og myndugleikar dugdu ikki so væl at handfara kunningina.

- Nógv hava tí sitið inni við óvaraðum spurningum, og nú fingu tey í hvussu er høvi til at seta hvør øðrum spurningar, sigur Steintór Jacobsen.

# Torbjørn málar altartalvu

**Listamálarin Torbjørn Olsen hevur fingið sum uppgávu at mála altartalvu til eina elligamla kirkju í Danmark**



Randi Jacobsen

Á heystframsýningini, sum er á skipasmiðjuni í Havn nú, hevur listamálarin Torbjørn Olsen tveir málningar við religiøsum motivi. Annar er av krossfesta Jesusi og hon av Jesusi og lærusveinum hansara.

– Hasar havi eg gjørt undir fyrireikingunum til eina altartalvu, sum eg skal mála, sigur Torbjørn Olsen.

Kirkjan, sum skal hava nýggja altartalvu, er í Snejbjerg uttan fyri Herning í Danmark.

Kirkjan her nokkso sermerkt. Elsti parturin er frá umleið 1200.

Snejbjerg kirkja hevur eina gamla rammu, sum skal prýða talvuna.

# Samson kemur aftur

**Í næstu viku væntar Poul Hansens Heilsølu aftur at fáa Samson-tubakkið, sum vegna umleggingar á verksmiðjuni ikki hevur verið at fingið í longri tíð**

Randi Jacobsen



*Nógvir føroyingar kunnu ikki vera fyri uttan ballið í kinnklovanum*

Her eru góð tíðindi til roykjarar, sum balla og roykja tubakkið Samson: Samson verður nú aftur at fáa.

Roykjarar eu vanabundnir og halda seg til sama tubbakk, og tí komu fleiri fólk í dýrastu neyð, tá ið handlar og kioskir vóru útseldir fyri Samson.

Sum skilst hava bæði handlar og heilsølan verið kimað niður av fólki, sum hava spurt eftir Samson.

Poul Hansens heilsøla upplýsir, at Samson verður aftur at fáa heilt skjótt, kanska longu í hesi vikuni. Tubakkið hevur verið útselt orsakað av umlegging á verksmiðjuni.